gult cyan magenta svart



# Watson er danskt málsøki

*Føroysku myndugleikarnir kunnu einki annað gera við vitjanina hjá Paul Watson, enn at kunna um grindadráp*




JOHN JOHANNESSEN

Meldingarnar úr landsstýrinum í sambandi við, at Paul Watson í gjár kom til Føroya eru, at landsstýrið einki annað kann gera, enn at upplýsa um grindadráp. Restin er danskt málsøki.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, sigur hetta vera prógv um, hvussu lítið ræði føroyingar í veruleikanum hava í Føroyum.

Fer Paul Watson at nýta harðskap í sini herðferð í Føroyum, hevur landsstýrið, sambært Høgna Hoydal, onga ábyrgd og einki vald á økinum. Tað er haraftur-ímóti danska løgreglan og danska sjóverjan í Føroym, ið skulu taka sær av málinum.

Tað eru eisini danir, ið endaliga gera av, um Paul Watson yvirhøvur skal sleppa í land í Føroyum.

### Vístur av landinum

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár bar Rás 2 tíðindini um, at Paul Watson frá løgregluni hevði fingið boð um at fara úr Føroyum. Hetta varð gjørt við grundarlagi í einum norðurlendskum sáttmála, ið sigur, at um ein persónur er útvístur í einur Norðurlandi, kann eitt annað Norðurland útihýsa honum við grundarlagi í hesum.

Paul Watson er nevniliga útihýstur úr Íslandi, og ger hetta, at hann eisini kann burturvísast úr Føroyum.

Tíverri bar ikki til hjá Sosialinum at fáa viðmerkingar frá myndugleikunum um hesi tíðindi, áðrenn blaðið fór til prentingar. Úr Tinganesi fingu vit at vita, at málið hoyrdi undir donsku løgregluni í Føroyum, og tí áttu vit at venda okkum til løgregluna.

Men løgreglan vildi einki siga um málið.

### Landsstýrið hevur rætt

Árni Olafsson úr danska uttanríkisráðnum váttar, at landsstýrið onga ávirkan hevur á, um Paul Watson kann sleppa inn um Føroyska tollmarkið, ið er tríggjar fjóðringar. Hetta er nakað, ið løgreglan, sjóverjan og í seinasta enda løgmálaráðið gera av.



## Watson vístur úr Føroyum

*Norðurlendsk passavtala ger, at Paul Watson ikki hevur loyvi at koma inn um føroyska pass markið*

JOHN JOHANNESSEN

Av tí at Paul Watson er burturvístur úr Íslandi og Noreg, hevur hann ikki loyvi at koma til Føroya.

Hetta váttar danska løgmálaráðið.

Sambært norðurlendsku passavtaluni, hevur løgreglan fullan rætt til at sýta Paul Watson at koma inn um føroyska pass markið, ið er tríggjar fjóðringar úr landi.

Løgverjan gav um middagsleitið í gjár Paul Watson boð um at fara úr Føroyskum sjóøki.

Danska løgmálaráðið verður við jøvnum millumbilum kunnað um støðuna.

gult cyan magenta svart



# Óynsktir umborð

*– Vit koma í friðarørindum og vilja ikki hava svartklæddar geriljamenn umborð, sigur Paul Watson*



DIA MIDJORD

Væl brynjað løgverjulið, ið eisini segði seg umboðað tollvaldið, ætlaði sær umborð á Ocean Warrior um tíggju tíðina í gjáramorgunin. Men hetta varð teimum noktað.

Sambært Paul Watson, umhvørvismanni og undangongumanni í felagsskapinum Sea Sheperd, so er Ocean Warrior í altjóða sjógvi, og tá hava myndugleikarnir onga atgongd.

### Er innanfyri

Vit liggja við skjóttgangandi bátinum Camillu hjá svarta skipinum við sjóræn-araflaggi frammi í gron. Sambært skipara okkara, so eru vit góðar tríggjar fjórðingar innanfyri markið ella 7 fjórðingar í ein landssynning úr Borðuni.

Skamt í frá liggur skjóttgangandi báturin Silja úr Vestmanna. Har er ein riðil av løgverjumonnum umborð. Ein teirra er varakommiserurin Hendrik Rubeksen, men hann hevur ikki stórvegis viðmerkingar.

– Vit liggja bara og bíða eftir boðum, sigur politisturin og slær fast, at eingin hevur loyv at fara umborð á skipið fyrr enn tað er tollavgreitt.

### Hvalaljóð

Umborð á Ocean Warrior er ein hópur av fólki. Fleiri síggjast við myndatólum, onkur hevur bandupptakara og nøkur upptøkutól eru eisini at síggja.

Frank Thrinkle, talsmaður í felagsskapinum Sea Sheperd, og sjálvur ovastin Paul Watson eru teir, ið tosa við okkum. Hini umborð standa bergtikin og eygleiða tær báðar forkempurnar.

Vit spyrja hvussu teir noktaðu politinum at sleppa umborð.

– Á friðarligan hátt. Vit hava ongantíð skatt nakran persón í okkara atsóknum, sigur Frank Thrinkle.

Meðan prátað verður, hoyrast brádliga hvalaljóð. Eingin hvalur er nærhendis uttan tann, ið Paul Watson hevur fest á brúnna á skipinum. Vit leggja til merkis, at Ocean Warrior hevur eina sterkan hátalara, ið gevir frá sær hesi løgnu dýraljóðini.

### Góða tíð

Ocean Warrior hevur sambært myndugleikunum ikki fráboðað, at hann er komin inn í føroyskt økið. Og hvar hann fer og nær hann fer, er ikki greitt enn.

– Vit hava tað gott í løtuni. Veðrið er gott, og vit hava ríkiligt av mati til øll umborð, sigur Paul Watson.

Á leið 50 fólk eru umborð. Helmingurin er fjølmiðlafólk úr eitt nú Kanada, Fraklandi, Hollandi, Týsklandi og Ungarn.

Hvat er so ætlan tykkara.

– Vit liggja bara og bíða. Okkara endamál við ferðini er at hjálpa grindahvalinum. Vit ætla at bera so í bandi, at grindahvalurin ótarnaður kann ferðast millum oyggjarnar, uttan at verða rikin á land og dripin, sigur Frank Thrinkle.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Sunny**
1.4 LX, brúnur, 4 hurðar, árg. 1991
**48.000**

**Nissan Primera**
2.0 GX, bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 36.000 km.
**147.000**

**Nissan King Cab**
2500 Diesel, reyður, 2 hurð., árg. 1987, 150.000 km.
**45.000**

Sosialurin

**Peugeot**
306 Style 1.6, bláur, 5 hurð., árg. 1996, 60.000 km.
**100.000**

**Ford Escort**
1.6 CLX Zitec, brúnur, 5 hurð., árg. 1995, 71.000 km.
**78.000**

**Land Rover Discovery**
TDi Pers., gráur, 5 hurðar, árg. 1998, 36.000 km.
**267.000**

**Mazda 626**
2.0, hvítur, 5 hurðar, árg. 1987, 240.000 km.
**8.000**

**Opel Astra**
1.6 Club, silvurgráur, 5 hurð., árg. 1999, 11.000 km.
**142.000**

**Peugeot 306 Style**
1.6, reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 35.000 km.
**103.000**

**Peugeot 406 Coupe**
2.0 Pininfarina, reyður, árg. 1998, 14.000 km.
**200.000**

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/f Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Bilpakkar summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team 85 · 31 65 11

4 fólk í bili

Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn

Ísland
Fráf. Tórshavn 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo